# Barnaískoyti

Mint verður á, at umsóknir um barnaískoyti sambært løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, partur 2a (§§19a-19f), fyri oktober ársfjórðing 2008, skulu vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 1. september 2008.

Umsóknarbløð fáast á økisdeildunum hjá Almannastovuni í Klaksvík, Saltangará, Tórshavn og á Tvøroyri ella við at skriva tað út frá heimsíðuni: www.almannastovan.fo.

almannastovan

## MÓTTØKA AV ULL

**SIRRI í Vági**
tekur ímóti ull
frá 4. til 30. august 2008

Fyri ull, ið er turr og væl hagreidd, letur Sirri 5,00 kr fyri kilo, sum verður flutt á konto. Neyðugt er at upplýsa konto nr., um tað ikki er latið Sirri áður.

Harumframt fær innlatarin 5,00 kr fyri kilo í stuðulsískoytið, sum verður flutt av Royndarstøðini umvegis Føroya Gjaldstovu á upplýsta konto í peningastovnunum.

Postverk Føroya skipar flutningin til Sirri í Vági, og skal ullin latast í sekkir, ið fáast til keyps á Posthúsunum kring landið fyri 5,- kr. stk. Sekkirnir taka umleið 10 – 12 kilo hvør, og skulu teir vera snørdir og hava spjaldur við navni, bústaði og tlf. nr. hjá sendara á. Postverkið tekur bert ímóti ull í hesum sekkjum. Ullin kann latast inn á Posthúsini í nevnda tíðarskeiði ella avtala kann gerast við Postverkið um at avheinta teir hjá sendaranum. Sirri rindar fyri flutningin.

Tann parturin av ullini, sum ikki kann gagnnýtast, skal vera skildur frá og beindur burtur á staðnum ella á rættini á forsvarligan hátt.

Gjørt verður vart við, at ullamóttøkan skilar sær rætt til at geva lægri ella ongan prís fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s ull við skarni, sandi, mosa o.ø. í.

**Royndarstøðin**
Frammi í Dal 166
FO-410 Kollafjørður
Tlf. 47 90 01

**Sirri**
FO-900 Vágur
Tlf. 22 40 06
T-postur: sirri@sirri.fo

KOYRIKORT?
EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 27. august 2008 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**



# Bilur til sølu

Ssangyong Rexton II vørubilur árg. mars 2007.

4 hjóls trekk, ABS bremsur, 4 airbags, air-condition, alarmur, alu-felgur, centrallás, elspegl við hita, elrútar aftan, elrútar framman, fløguspælari, hiti í setrum framman, hjulspinsregulering, klimaanlegg, power-stýring, takboylar, tokulyktir, tónaðir rútar, tráðleyst centrallás, leður setur.

**Tlf 216525**



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

# Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. desember til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.

Ring á tlf. 211322

Lesið Sosialin -so eru tit við!

KIOSK ACTIV

## Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir krambafólkið til at arbeiða kvøldvaktir og náttarvaktir í Kiosk Activ, J. Broncksgøtu at byrja skjótast gjørligt.

Eisini sóknast vit eftir vaskifólki.

**Nærri fæst at vit við at ringja á tlf. 73 37 41**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Endurlýsing

# Fíggjarleiðari á Fróðskaparsetrinum

**Søkt verður eftir fíggjarleiðara til Setursskrivstovuna á Fróðskaparsetrinum, at byrja 1. oktober 2008 ella skjótast til ber.**

**Starvið**
Fróðskaparsetur Føroya er ein hægri lærustovnur í støðugari menning. Tann 1. august 2008 varð nýggj lóg um Fróðskaparsetur Føroya sett í gildi. Við hesi lóg eru Sjúkrarøktarfrøðiskúlin og Læraraskúlin lagdir saman við Fróðskaparsetrinum.

Setursskrivstovan fær væntandi ein týðandi leiklut í samanleggingini, og saman við leiðsluni á Fróðskaparsetrinum kemur tú miðvíst at arbeiða við hesi tilgongd.

Í samstarvi við leiðslu og fyrisiting á Fróðskaparsetrinum fert tú millum annað at hava ábyrgdina av hesum uppgávum:

- ráðgeva leiðsluni í fíggjar-, lønar- og roknskaparviðurskiftum
- samskifti við Fíggjarmálaráðið
- gerð av fíggjarætlan og roknskapi
- eftirlit við rakstri
- orðing av mannagongdum á fíggjarøkinum

**Førleikakrøv og persónurin**

Vit vænta, at tú hevur:
- viðkomandi prógv frá hægri lærustovni ella drúgvar royndir innan fíggjar- og roknskaparøkið
- evni at raðfesta og tilrættisleggja arbeiðið
- góð samstarvsevni
- áhuga í útbúgvingarviðurskiftum
- góðan førleika innan KT-økið
- evni at laga teg til broyttar arbeiðsumstøður.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt fulltíðarstarv. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum, ævisøgu (CV) v.m. skulu vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 2. september 2008.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fróðskaparsetur Føroya,
Setursskrivstovuna
J.C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Rúnu Hjelm, setursskrivara á tlf. 55 25 04 ella t-post: runah@setur.fo

SETURSSKRIVSTOVAN · WWW.SETUR.FO · SETUR@SETUR.FO